# Tøkk

Hjartaliga takka vit fyri ta stóru samkenslu og hjálpsemi, ið varð sýnt okkum, tá ið okkara góða mamma, dóttir og systir

**Maria S. Tróndarson**

andaðist og varð jarðað

Takk til prestarnar fyri góð og troystarík orð og takk til tykkum, ið sungu so vakurt í kirkjuni.
Takk til lærarar og næmingar fyri teirra umsorgan.
Takk til Venjingarskúlan og øll tykkum, ið hjálptu so væl til við ervinum.
Takk fyri blómur, kransar og gávur til børnini.
Takk til sangarar og til øll, ið fylgdu henni til hennara seinasta hvíldarstað.

**Rannvá, Tróndur og Tóraldur**
**Doris og Tróndur**
**Jógvan og Leivur**

---

†

Kunngjørt verður fyri ætt, vinum, og kenningum at kæri maður, pápi, verfaðir, abbi og langabbi

**Georg J. F. Thorsteinsson**
f. 19. februar 1926 í Trongisvági, búsitandi í Tórshavn

andaðist í heiminum mikudagin 12. februar 2003.

Jarðarferðin verður sunnudagin 16. februar 2003 kl. 14.00 úr Vesturkirkjuni.

*Familjunnar vegna*
**Marita, Hans Arni, Kári, Sidsel, Heri, Randi og Thordur við familjum**

Tey, ið vilja minnast Georg kunnu lata eina peningagávu til sunnudagsskúla arbeiðið í Meinigheitshúsinum, konto í Sparikassanum.

---

# Gudmundi L. Joensen
## til minnis



Tað var ein maður – og so við eitt var hann ikki meiri.

Soleiðis segði presturin við jarðarferðina hjá Kennedy forseta, og soleiðis kunnu vit eisini siga um Gudmund. Við eitt var hann ikki meiri.

Sum altíð, tá ungt nýtt fólk flytir til bygdina, vóru vit spent at fáa tey at kenna. Vit hava seinastu tíðina fingið ikki minni enn tveir kendar tónleikarar til bygdina, og nú Gudmund flutti til Nólsoyar hevði hann nógva mentan við sær. Var góður sjónleikari og ikki minni góður tenorur, sum styrkti kórið almikið.

Gudmund byrjaði at syngja við kórinum, tá kórið byrjaði venjing aftur eftir summarsteðgin. Tey, sum kendu hann framman undan vistu, at hann var ein stinnur sangari, og vit, sum betur komu at kenna hann gjøgnum sangin, ásannaðu skjótt, at her var fongur fingin fyri kórið.

Gudmund sýntist at vera fallin til í Nólsoy. Fekst við seyð og var við stóra haru-dagin, sum nú aftur er við at gerast tradition í Nólsoy.

Áhugin fyri sjónleiki gjørdi, at ein leikur var á veg at verða umsettur, júst við tí fyri eyga, at Gudmund skuldi fáa ein av leiklutunum. Hann hevði jú stóran áhuga fyri sjónleiki, og var nógv við undan lestrartíðini í Danmark.

Í kórinum kendu vit Gudmund sum ein skemtiligan ungan mann. Honum dámdi væl at tosa um viðurskifti, sum fóru fram í samfelagnum, hevði áhuga fyri samfelagsviðurskiftunum. Var eisini áhugaður í politikki.

Gudmund hevði ivaleyst sínar trupulleikar í lívinum, men fyri okkum at síggja ongar, sum ikki kundu yvirkomast. Vit kunnu bert saman við Poul F ásanna: Ei svarar úr loyndardýpi, um vit spyrja æviga hví!

Saknurin hjá okkum í kórinum er stórur. Tað ber næstan ikki til at ímynda sær, hvussu saknurin er hjá tykkum nærmastu. Um tað er nøkur troyst so skulu tit vita, at vit hava stóra samkenslu við tykkum.

Sjálvandi vildu vit helst sloppið undan at skriva minningarorð. Vit mugu bara trúgva, at Gudmund hevur tað gott, har hann nú er.

Við hesum fátøku orðum vilja vit lýsa frið yvir minnið um kæra sangfelaga okkara, Gudmund L. Joensen.

**Nólsoyar Sangkór**

---

†

Kunngjørt verður at kæri pápi, abbi og langabbi okkara

**Tróndur Juul Hansen,**
Skopun

andaðist hósdagin 12. februar, 81 ára gamal.

Jarðarferðin verður úr Skopunar kirkju sunnudagin kl. 14.00

**Børnini**

---

# Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum, sum gleddu okkum á 90 ára føðingardøgunum og 65 ára brúdleypsdegnum.

*Blíðar heilsanir*
**Óla Hans Pauli og Elsebeth Maria Hansen**
**Svínoy**

---


**Vetrarferðatilboð** 14.09.2002 - 10.05.2003

*The North Atlantic Link*



galdandi frá 14.09.2002 - 10.05.2003

**Íroknað prísin er:**
Ferðin aftur og fram við Norrönu í 4-koyggjukamari við WC/bað.

Uppihald omanfyrinevnda dagatal á nevndu frítíðardeplum. Danland hevur eisini líknandi deplar aðrastaðni í Danmark.

**Ebeltoft** (myndin) **· Blokhus · Hirtshals**

**4.995,-**
*gisting 7 nætur*

Hesir eru í Søndervig, Fanø, Rømø, Bork Havn, Lemvig, Skagen, Øster Hurup, Fåborg, Rudkøbing, Østersøen - Møn, Blåvand og Bornholm.




**Shetland Cruise**

| | 4-koyggjuk. við WC/bað | 2-koyggjuk. við WC/bað |
|---|---|---|
| Grand-/Queens Hotel | 1.550,- | 1.730,- |
| Shetland-/Lerwick Hotel | 1.690,- | 1.870,- |
| Herrislea House Hotel | 1.550,- | 1.730,- |
| Privat Gisting | 1.280,- | 1.460,- |
| Vallaraheim | 1.010,- | 1.190,- |

**Íroknað prísin er:** Ferðin aftur og fram við Norrönu í einum av nevndu kamarssløgum. Fyri ShetlandsCruise 2 nætur og vikuferð 9 nætur v. morgunmati á einum av nevndu gistingarstøðum.

Á vallaraheiminum er ikki íroknaður morgunmatur. Á hotellunum og fyri privata gisting er innivist í dupultkamari, meðan á vallaraheiminum í felagsrúmi. Fyri børn, einakamar ella eykasong eru aðrir prísir galdandi. Nærri fæst at vita á skrivstovu okkara.

**Pakkaferð** við innivist í 9 dagar

| | 4-koyggjuk. við WC/bað | 2-koyggjuk. við WC/bað |
|---|---|---|
| Grand-/Quenns Hotel | 4.100,- | 4.280,- |
| Shetland-/Lerwick Hotel | 4.940,- | 5.120,- |
| Herrislea House Hotel | 4.100,- | 4.280,- |
| Privat Gisting | 3.220,- | 3.400,- |
| Vallaraheim | 2.030,- | 2.210,- |




**Easterhoull Chalets**
1 vika í summarhúsi
*2 vaksin og 2 børn við bili*

| | 4-koyggjuk. við WC/bað |
|---|---|
| Hús við 2 rúmum | 4.940,- |
| Hús við 3 rúmum | 5.630,- |

team85

*Pakkaferð við gisting á hotelli*
*2 ferðandi í bili, gisting 7 nætur á Hotel Hanstholm*
**Íroknað prísin er:**
Ferðin aftur og fram við Norrönu í 4-koyggjukamari v. WC/bað. Uppihald: 7 nætur á Hotel Hanstholm í dupultkamari við WC/bað. Á hotellinum er morgunmatur íroknaður.
*fyri hvønn*
**3.290,-**
*galdandi frá 14.09.2002 - 10.05.2003*

2 fyri 1
*ferðist tvey - gjaldið fyri ein!*
*galdandi til og við 3. mai 2003*
*Ferð fyri tvey vaksin við bili Tórshavn - Hanstholm og aftur í 2 koyggjukamari við WC/bað*
**2.990,-**

2 fyri 1
*ferðist tvey - gjaldið fyri ein!*
*galdandi til og við 3. mai 2003*
*Ferð fyri tvey vaksin við bili Tórshavn - Lerwick og aftur í 2 koyggjukamari við WC/bað*
**2.200,-**

SMYRIL LINE
e-mail: booking@smyril-line.fo · www.smyril-line.fo
**SMYRIL LINE**
Tel 34 59 00








STEPHANSSONS HÚS



Nær eru vit 100% nøgd við okkara flutningsfelag?

Vit hava spurt okkum sjálv, kagað út í heim og kannað hvussu onnur gera, spurt okkara núverandi viðskiftarar og vónandi komandi: Hvat vantar? Hvønn tørv hava tit?

Eftir svørunum vit hava fingið, vóna vit - um ikki 100% so næstan - at vit við okkara nýggja bygningi á Skansabryggjuni, nýggju tænastunum og betranini av núverandi tænastum, fara at nøkta vaksandi tørvin á framkomnum og tryggum flutningi til og úr Føroyum.

* Vøran stendur ongantíð úti í regni og vindi.
* Tørvar tær goymslupláss, ber nú til at leiga seg inn í pakkhúsbygningin.
* Goymslustýring á vøruhotellinum er eisini ein nýggj tænasta.
* Fært tú eina sending til landið, leggur tú hana í vøruhotellið.

GREIÐ LEIÐ EIMSKIP

Tá ið brúk er fyri vøruni, koyra vit hana á rættan stað, ein part nú og annan tá.
* Frígoymsla, ein nýggj tænasta, har vøran kann goymast ótollað í upp til 3 ár, til hon verður tikin út eftir tørvi. Vøran kann sendast av landinum aftur ótollað, um ikki er brúk fyri henni.